

# Rættilig gongd komin á sløkkiliðs samstarvið

Ein fult útgjørdur brandbilur er nú norðan fyri fjall, og søkt verður eftir sløkkiliðsfólki í Hvannasunds og Viðareiðis kommunum, so sløkkiliðssamstarvið er byrjað í verki.

Hósdagin 8. apríl 2010 skrivaðu borgarstjórarnir og leiðarin fyri Brunaumsjón Landsins undir samstarvsavtalu um eldsløkking millum Viðareiðis, Hvannasunds og Klaksvíkar kommunur, og nú er gongd rættiliga komin á hetta sløkkiliðssamstarvið.

Høli eru funnin á Viðareiði til eina sløkkiliðsstøð. Hetta er í bygninginum, har Papcon einaferð helt til, og eru fólk nú í ferð við at innrætta ein part av bygninginum til sløkkiliðsstøðina.

Hendan støðin skal hava ein sløkkiliðsbil, og átta sløkkiliðsmenn vera tilknýttir støðini, fýra í Hvannasunds Kommunu og fýra í Viðareiðis Kommunu.

Søkt hevur verið eftir fólki í Hvannasunds og Viðareiðis kommunum, og har verða fólk sett í næstum.

Bilur er útvegaður úr Danmark í sambandi við avtaluna, og er ein sløkkiliðsbilur farin norður til Viðareiðis at standa.

*kelda: www.klaksvik.fo*

# Pensjón fyri søgn




Meðan múgvandi dusa sær í marglæti, verður minni og minni til fólkapensjónistar

## Í DAG

*9 / 13 °C*



1-6 m/s 1-6 m/s

Lot til stívt andøvsgul av vestri, undir 6 m/s, sum í kvøld snarar í ein útsynning og fyrrapartin týsdag í ein sunnan. Mest skýggjað við mjørkaflókum, men turt. Hitin millum 9 og 13 stig.

## TÝSDAGIN

*8 / 12 °C*



3-8 m/s 3-8 m/s

Hann frískar vindin upp í lot til andøvsgul av landsynningi, 3-8 m/s, skýggjað við mjørkaflókum og út á kvøldið regn. Hitin alt samdøgrið millum 8 og 12 stig.

## MIKUDAGIN

*8 / 12 °C*



3-8 m/s 5-10 m/s

Lot til andøvsgul av landsynningi, 3-8 m/s, kanska upp í stívt andøvsgul 10 m/s. Skýggjað við mjørkaflókum og nakað av avfalli. Hitin millum 8 og 12 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ

Ein hátrýstryggur meiri enn 1020 hPa yvir bretsku oyggjunumgongur í ein eystan. Eitt lágtrýst sunnan fyri Ísland gongur eystureftir og eitt tilhoyrandi brúgvalag rekur týsdagin inn yvir Føroyar av vestri. Fríggjadagin kemur eitt anað brúgvalag inn yvir Føroyar av norði

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 61 mm

## Hitalagið kring knøttin



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. juni | 03:13 | 15:37 | 02:13 | 14:37 | 02:28 | 14:52 | 05:13 | 17:37 | 06:13 | 18:37 | 01:28 | 13:52 | 00:28 | 12:52 | 03:28 | 15:52 | 04:28 | 16:52 | 02:58 | 15:22 | 04:13 | 16:37 |
| 22. juni | 04:02 | 16:27 | 03:02 | 15:27 | 03:17 | 15:42 | 06:02 | 18:27 | 07:02 | 19:27 | 02:17 | 14:42 | 01:17 | 13:42 | 04:17 | 16:42 | 05:17 | 17:42 | 03:47 | 16:12 | 05:02 | 17:27 |
| 23. juni | 04:53 | 17:19 | 03:53 | 16:19 | 04:08 | 16:34 | 06:53 | 19:19 | 07:53 | 20:19 | 03:08 | 15:34 | 02:08 | 14:34 | 05:08 | 17:34 | 06:08 | 18:34 | 04:38 | 17:04 | 05:53 | 18:19 |
| 24. juni | 05:45 | 18:09 | 04:45 | 17:09 | 05:00 | 17:24 | 07:45 | 20:09 | 08:45 | 21:09 | 04:00 | 16:24 | 03:00 | 15:24 | 06:00 | 18:24 | 07:00 | 19:24 | 05:30 | 17:54 | 06:45 | 19:09 |
| 25. juni | 06:34 | 18:59 | 05:34 | 17:59 | 05:49 | 18:14 | 08:34 | 20:59 | 09:34 | 21:59 | 04:49 | 17:14 | 03:49 | 16:14 | 06:49 | 19:14 | 07:49 | 20:14 | 06:19 | 18:44 | 07:34 | 19:59 |

Kelda. Álmanakkin 2010